# Finnland í HM-undankapping

Føroyar eru ikki einasta norðurland í HM-Undankappingini á hesum sinni. Kappingin er deild í 7 bólkar, og Føroyar eru í bólki saman við Serbia og Ísrael. Finnland er í bólki saman við Bosnia&Herzegovina og Litava, og har hava teir tapt ein dyst og vunnið ein. Finnland spælur í bólki 5. Endaspælið verður spælt í Croatia í 2009, og spennandi verður at síggja, um kanska Serbarnir fara at klára seg væl. Teir hava í øllum førum eitt sera sterkt lið, og kunnu náa langt, um tað gongst teimum eftir vild, og hepnið er við teimum.



# Føroya Banki høvuðsstuðul hjá Ljósinum

Fimleikafelagið Ljósið og Føroya Banki eru farin inn í nýggja árið við nýggjari stuðulsavtalu. Avtalan hevur við sær, at øll lið og allir einstaklingar hjá Ljósinum fara at bera búmerkið hjá Føroya Banka kappingarárini fram til 2009. Forkvinnan í Ljósinum, Ann Hansen, fegnast eisini um avtaluna: – Við hesi avtaluni kann felagið fremja ymiskt, sum ætlanin hevur verið at framt í eina tíð, t.d. at førleikamenna leiðarar. Hesum fáa okkara limir vónandi ágóða av. Eisini ætla vit at skipa fyri venjingarsamlingum og venjingarlegum heima sum uttanlands, sigur hon við heimasíðuna hjá Føroya Banka.



*Manchester United Fjepparafelag Føroyar hevur fingið flúgvandi byrjan. Eftir stovnandi aðalfundin í Rex í Havn 15. desember kundu fjepparanir fegnast um 1-0 sigur móti Liverpool á Anfield*

# United fjepparafelagið hevur skipað seg

TÍÐINDASKRIV

Føroyska fjepparafelagið hjá sigursvanda, enska meistaraliðnum Manchester United hevur nú skipað seg við Hera Simonsen sum formanni.

Føroyska fjepparafelagið hjá Manchester United hevur fingið eina flúgvandi byrjan. Higartil hava umleið 200 fólk teknað seg sum lim í felagnum. Stovnandi aðalfundur var fyri jól og um vikuskifti skipaði nevndin seg soleiðis:

Formaður: Heri Simonsen
Næstformaður: Birnir Hauksson
Kassameistari: Jóannes Egholm.
Skrivari: Jón Brian Hvidtfeldt
Nevndarlimur: Jan Poulsen
Tiltakslimur: Leivur Langgaard

Harumframt er felagið skipað við tveimum undirnevndum, eini ferðanevnd og eini heimasíðunevnd. Almenna navnið á felagnum er Manchester United Football Club's Supporters Club Faroe Islands Branch, á føroyskum Manchester United Fjepparafelag Føroyar, stytt MUFF. Endamál felagsins er at virka til frama fyri tey, sum stuðla Manchester United í Føroyum. At skipa fyri felagstiltøkum fyri allar limir. At skipa fyri ferðum til dystir hjá Manchester United. Og at virka fyri samanhaldi millum allar Manchester United fjepparar í Føroyum.

Felagið hevur higartil skipað fyri tveimum, almennum tiltøkum. Einum fyrireikandi fundi fyri at meta um áhugan fyri felagnum, og einum stovnandi aðalfundi, ið varð hildin á Rex sunnudagin 15. desember. Higartil hava umleið 200 fólk teknað seg sum lim í MUFF. Limagjaldið er 250 krónur um árið.

Felagið heitir á øll, bæði tey sum longu hava teknað seg sum lim, og tey sum ætla at tekna seg sum lim, um at senda felagnum ein teldupost til mu.fjepparar@gmail.com. Í teldupostinum skulu vera hesar upplýsingar: Navn, bústaður, fartelefonnummar og teldupostur. Eisini verður biðið um at vátta, hvørt felagið kann melda limagjaldið til e-rokning, og hvørjari konto limagjaldið skal flytast av.

# Byrjanin var munurin



*Dia Midjord leggur taktik*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Vit fáa eina katastrofala byrjan í Serbia, og eru skjótt aftanfyri 7-0. Leygardagin komu vit á odda 3-0, og hetta legði lunnar undir væla úrslitið, føroyska landsliðið megnaði at fáa móti Serbia í Høllini á Hálsi um vikuskiftið. Vit spyrja landsliðsvenjaran um hansara áskoðan**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

- Byrjanin á Hálsi var sera góð, í mun til byrjanina í Serbia, og tað viðførdi at okkara trúðu uppá at tað lat seg gera at spæla við, sjálvt móti serbum. Menn fingu dirvi og áræði, og tordu at taka neyðugu avbjóðingarnar, ið skuldu til, fyri at knúgva sterku serbunum, sigur landsliðsvenjarin, Dia Midjord.

- Vit fingu virkuliga vaskað talvuna reina, og kunnu ganga við røttum ryggi og vera ernir, sigur Dia, og leggur afturat, at vit sóu eitt føroyskt lið, ið kempaði fyrimyndarliga.

Er føroyskur hondbóltur á einum vegamóti?

- Vit arbeiða við einum fundamenti her, og tá hesir dystirnir eru av, verður tosað um tingini, og tá verður viðgjørt, hvørjar framtíðarætlanirnar verða, sigur landsliðsvenjarin, ið metir at føroyskur hondbóltur er á einum sera høgum støði, tá hugsað verður um at onginrættuligur landsdystur móti einari stórtjóð hevur verið spældur í langa tíð. Dia vil tó viðurkenna at langt er eftir á mál.

- Eg vil ikki lova at vit vinna móti Ísrael, men eg meti at vit klára at fylgja teimum líka til mállinjuna, sigur ein avgjørdur og fegin landsliðsvenjari.

Seinast føroyskt landslið møtti Ísrael, endaði støðan við 29-24 sigri til ísralittar. Og tað er ikki so ræðuliga nógv á muni. Kanska vit megna eitt betur úrslit hesaferð.

Tað mugu vit so í øllum førum vóna. Og ynskja føroyskum landsliðshondbólti góðan byr framyvir.